## Russiskur trolari sakk

Ein maður lat lív, tá russiski trolartin Koralnes sakk vestarlaga í Barentshavinum í morgun. Hinir 16 vórðu bjargaðir. Klokkan sjey boðaði norska bjargingartænastan frá, at ein russiskur trolari hevði tikið 15 menn úr einum bjargingarbát á Tromsøflaketi. Ein tyrla hjá norsku bjargingartænastuni tók tveir aðrar menn upp av sjónum, men annar teirra var deyður. Teir russisku sjómenninir vórðu fyrrapartin fluttir við tyrlu til Tromsø, har teir komu undir læknahond. Koralnes, sum var 34 metrar langur, er fyrrverandi Strembingur og hoyrdi heima í Skopun. Skipið liggur nú á 160 favna dýpi 70 fjórðingar úr Tromsø.

## Íslendingar streyma til Noregs

Fyri meiri enn 1100 árum síðani rýmdu norðmenn til Íslands, men nú gongur streymurin tann øvugta vegtin, skrivar norska tíðindastovan NTB. Sagt verður, at síðani ársbyrjan eru 260, og tað er líka nógv sum alt árið í fjør. Kortini verður hildið, at tað veruliga talið er nógv størri. Íslendingafelagið í Noregi vísir á, at íslendingum nýtist ikki at boða frá flyting fyrr enn seks mánaðiir eftir, at teir eru komnir til Noregs, og felagið heldur, at umleið 2.000 íslendingar hava leitað sær til Noregs undan fíggjarkreppuni har. Av teimum munnu umleið 1.000 vera í Oslo, heldur felagið.

# SEV saknar politiskt útspæl og krevur samstarv

**SEV bíðar eftir politiskum útmeldingum, hvussu orkukervið skal byggjast út í framtíðini. – Tað er neyðugt við skjótari avgerð, skulu vit røkka málunum í almenna orkupolitikki Føroya, sigur nevndin. Haraftur-at vísa tey á týdningin við tøttum samstarvi – nakað, ið ikki altíð hevur eydnast til fulnar**

ORKA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

- Neyðugt er , at politisk støða verður tikin rættiliga skjótt til, hvussu útbyggjast skal komandi árini til tess at røkka málunum í almenna orkupolitikki Føroya. Hetta sigur nýggja nevndin í SEV í frágreiðing til ársroknskapin fyri í fjør, ið varð lagdur fram á ársaðalfundi felagsins.

Eftir at framtíðar orkumøguleikarnir og orkuútbyggingar Føroya hava verið viðgjørdar í fjølmiðlunum og á Løgtingi seinastu dagarnar, eftirlýsir einaráðandi elfelagið á føroyska marknaðinum, SEV, einum útspæli frá landspolitikarunum.

Á heysti í fjør samtykti táverandi umboðsnevndin í SEV eina 10 ára ætlan fyri útbyggingar. Nýggja nevndi metir tað hava stóran týdning at gera langtíðarætlanir innan orkuøkið í landinum, serliga við atliti at varandi orkumøguleikum.

Í ársfrágreiðingini ger nevndin vart við, at hon ikki er liðug at viðgera 10 ára ætlanina hjá undanfarna stýri.

### Kommunurnar mugu taka ábyrgd

Nevndin í SEV, við Páll á Reynatúgvu á odda, heldur eisini, at kommunurnar sum eigarar av SEV eiga at taka á seg ábyrgd innan gransking og menning innan framtíðar orkumøguleikar.

- Umframt at eiga stóru uppgávuan sum framtíðar orkuveitari í landinum við øllum tess avbjóðingum, eiga vit eisini stóru ábyrgdina mótvegis komandi ættarliðum av orkunýtarum. Og ta ábyrgdina eiga vit at taka á okkum sum búgvin partur av heimssamfelagnum, sigur nevndin í SEV í frágreiðingini.

### Vilja takast við í allar avgerðir

Í ársfrágreiðingini sigur nýggja nevndin eisini, at í samband við avgerðirnar um framtíðar útbyggingar er neyðugt við felags stevi og góðum samskifti millum SEV og landsmyndugleikarnar, sum vara av el-, orku- og náttúruøkinum.

Hetta hevur ikki altíð verið ført.

Tann 15. desember varð ein virkisætlan um at minka útlátið av veðurlagsgassi, nevnd »Skjótt syftir seiðir og tunga takið« útgivin og framløgd á Hotel Føroyum, í samband við at Innlendismálaráðið skipaði fyri veðurlagsráðstevnu.

Í viðmerkingunum til hesa virkisætlan, ið vóru umbidnar til viðgerðina í rættarnevndini av málunum hjá Tjóðveldi um minking av $CO_2$ og menning av varandi orku, ið hava verið viðgjørd á Løgtingi fyrradagin og í gjár, dylur SEV ikki fyri síni frustratión inn á ikki at hava verið við til at gera ritið.

»Við tað at orkuveiting, og herundir serliga elveiting, fyllir ein munandi part í ætlanini, bæði hvat umrøðu og ikki minni $CO_2$ minking viðvíkur, so hevur hetta heilt natúrliga alstóran áhuga og týdning fyri SEV.

Tí er tað sera hugstoytt at staðfesta, at SEV ikki er tikið við í hetta arbeiði, hóast størsti førleikin í landinum á hesum øki er júst at finna hjá SEV. Hetta kemur eisini til sjóndar, tá ið við líta at innihaldinum. Tann parturin av ritinum, sum er skrivaður um orkuveitingar, inni heldur fleiri faktuellar feilir.«



*Nevndin í SEV, við Páll á Reynatúgvu á odda, vil hava landsmyndugleikarnar at melda út sum skjótast, hvørjar ætlanir eru við útbyggingum á orkuøkinum í framtíðini. Eisini vil einaráðandi elfelagið takast við upp á ráð í øllum orkuspurningum*




*Súsanna Sørensen úr SamVit bjóðar útlendsku og føroysku gestunum vælkomnar til fyrilestrarnar í Norðurlandahúsinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Stór ferðavinnuráðstevna í Norðurlandahúsinum

**Í hesum døgum er stór ferðavinnuráðstevna í Norðurlandahúsinum. Út við 50 umboð fyri ferðaskrivstovur og fjølmiðlar úr 10 ymiskum londum eru komin til árliga Visit Faroe Islands átakið, sum Atlantic Airways og SamVit, nú Uttanríkisráðið, skipa fyri**

FERÐAVINNA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í dag, fríggjadag 24. apríl, hittast umboð fyri út við 50 ferðaskrivstovur og fjølmiðlar úr 10 ymiskum londum til fyrilestrar og workshops í Norðurlandahúsinum. Her fáa útlendsku gestirnir høvi at hitta føroyskar ferðavinnuveitarar. Í morgin verða útferðir á skránni og ferðaliðið fer avstað aftur sunnudagin.

Tiltakið, sum eitir Visit Faroe Islands, byggir á Fly Faroe átakið, sum Atlantic Airways hevur skipað fyri í fleiri ár.

Eftir Fly Faroe í fjør var avgerð tikin um at broyta navnið á tiltakinum fyri at gera tað til eitt átak fyri eina samlaða ferðavinnu.

SamVit og Atlantic Airways eru høvuðsfyrireikarar og eru sera væl nøgd við góðu undirtøkuna frá veitarunum.

Endamálið við átakinum er at fáa fatur í nýggjum ferðasmiðjum, sum vilja selja Føroyar og at halda sam-band við tey, sum longu hava Føroyar sum ferðafólkamál á skránni

- Vónin er, at Visit Faroe Islands mennist til árliga átakið, har ferðavinnan setur Føroyar sum ferðafólkaland á breddan og sum gerst staðið, har útlendskir ferðasmiðir og fjølmiðlar mugu koma fyri at kunna seg um nýggjastu tilboðini, skrivar SamVit á heimasíðu sínari.

### National Geographic selur Føroyar

Í sølutekstinum til útlendsku gestirnar nýtir ráðstevnan heiðurin frá National Geographic Traveler sum oyggjaland nummar eitt í heiminum at vitja.

- Ráðstevnan verður í endanum á apríl, og okkara ynski er at geva tær eina smakkiroynd av hvat Føroyar hava at bjóða, og at vísa tær hví Føroyar vóru valdar til fremsta oyggjaland í heiminum at vitja av National Geographic Traveler.

Hesin heiður verður dúgliga nýttur at branda Føroyar við, og hevur hetta eftir øllum at døma eisini vakt áhugan hjá mongum uttanífrá.